## Reglugerð fyri wc'ið við Mylnugøtu

- WC'ið er opið frá kl. 08.00 til kl. 22.00 allar gerandisdagar, og frá kl. 10.00 til kl. 22.00 allar haldidagar.
- Tað er sera umráðandi, at húsið altíð er reint, og at tað bert verður brúkt til tess endamál.
- Tey einstøku wc-rúmini skulu vaskast væl og virðiliga minst eina ferð um dagin.
- Øll vøsk, kummur og gólv skulu vaskast hvønn dag.
- Veggflísar skulu vaskast tvær ferðir um vikuna.
- WC-pappír má ongantíð tróta.
- Tey vitjandi skulu hava góðar umstøður at vaska og turka hendur.
- Um okkurt í húsinum verður brákað, skal tað umvælast beinan vegin. Er skaðin meira enn hvat umsjónarfólkið sjálvt kann umvæla, skal arbeiðsformaður kommununnar hava boð um hetta, so neyðug umvæling kann verða framd skjótast gjørligt.
- Tey einstøku wc-rúmini skulu vera læst, tá ið tey ikki verða brúkt.
- Tað skal altíð vera gjørligt at brúka húsið uttan órógvan av øðrum vitjandi. Bannað er øllum ørindaleysum at koma inn.
- Umsjónarfólkið hevur umsorgan fyri at henda reglugerð verður hildin, og er tað somuleiðis tey, ið skulu gera tað arbeiðið, sum reglugerðin ásetur.
- Umsjónarfólkið skal, í arbeiðstíðini, bera eyðkennisbúna.
- Henda reglugerð kom í gildið tann 1. desember 1981.

Tórshavn, tann 11. november 1981
Býarverkfrøðingurin